# Amy Diamond á Summar Festivalin



What's In It for Me var veruliga gjøgnumbrotið hjá Amy Diamond, sum um fýra vikur fer at syngja á Summarfestivalinum í Klaksvík

**Svenska ungdómsstjørnan Amy Diamond fer at syngja á Summar Festivalinum í august. Hon hevur havt hitt í fleiri londum og er yngsti sangarin, ið nakrantíð hevur vunnið eina virðisløn á Nordic Music Award**

SUMMARFESTIVALUR
*tíðindaskriv*

Summar Festivalurin kunnger í dag, at seinasta útlendska tónleikanavnið, ið kemur á festivalin í ár, er unga svenska songkvinnan Amy Diamond.

15 ára gamla Amy Diamond gjørdist kend um øll norðanlond við sanginum What's In It For Me, men bæði áðrenn hendan sangin – og serliga síðani – hevur hon gjørt nógv við tónleikin. Hon hevur sungið í sjónvarpssendingum, givið fløgur út og verið við á stórum konsertum og festivalum.

Ein av stóru løtunum hjá Amy var, tá ið hon í 2005 vann Nordic Music Awards.

## Gjøgnumbrot og virðislønir

Amy Diamond hevur svenska mammu og enskan pápa, og fyrstu fýra árini av lívi sínum búði hon í Onglandi. Síðandi fluttu til Svøríkis at búgva.

Sum smágenta dugdi Amy væl at standa á skoytum, og hon vann nógvar kappingar. Hon gekk eisini á dansi- og sjónleikaskúla, og alt hetta hevði við sær, at unga Amy dugdi væl at framføra fyri fólki. Tá ið tónleikurin so bankaði á dyrnar, var ein veruliga barnastjørna født. Amy Diamond sang í sjónvarpssendingum í Svøríki, og talentið var so stórt, at plátufeløg fingu áhuga fyri henni. Í 2005 fekk hon veruliga gjøgnumbrotið hjá sær við sanginum What's In It For Me, sum gjørdist eitt hitt í fleiri londum.

Heima í Svøríki seldi fyrsta útgávan hjá Amy Diamond óhoyrt væl, konsertframførslurnar vóru sannførandi, og tað endaði við fleiri virðislønum til ungu songkvinnuna hetta árið. Millum annað var hon Nordic Music Awards fyri besta norðurlendska hittið, og hon er yngsti sangarin, ið nakrantíð hevur vunnið hesa virðisløn. Amy vann eisini aðrar virðislønir fyri sína fyrstu útgávu og sangin What's In It For Me, og millum annað er hon yngsti sangarin, ið nakrantíð er tilnevndur til eina svenska Grammy.

## Til Føroya at syngja

Amy Diamond hevur úr at gera, tí hon hevur eisini gjørt avtalur við fyritøkur í Svøríki um PR-arbeiði, og hon hevur millum annað verið andlit hjá ítróttarketuni Stadium í lýsingarátøkum.

Tónleikurin stendur tó framvegis ovast á listanum hjá Amy Diamond, og nú kemur hon fyri fyrstu ferð til Føroya at syngja. Amy fer á konsertferð í summar, og ein av framførslunum verður á Summar Festivalinum í Klaksvík, har hon verður serligur gestur til barnashowið og Silvalandið hjá Norðoya Sparikassa.

Amy Diamond arbeiðir í løtuni við nýggjari útgávu, sum skal koma út seinni í hesum árinum.

# T-NASS – Hvalateljingar nú eisini í gongd kring Føroyar

TÍÐINDASKRIV

Sjøtul er nú settur á stóru altjóða hvalateljingina T-NASS tvørturum Norðuratlantshavið. Bæði skip og flogfør eru nú í ferð við at eygleiða hvalir frá eysturstrondini á Kanada og heilt til Barentshavið allan juli mánað.

Føroyar luttaka við einum skipi. Náttúrugripasavnið hevur leigað M/V Thor Chaser í knappar fýra vikur. Skipið er í hesum sambandi útgjørt við serligum palli til eygleiðarar. Við eru fimm føroyskir og tríggjar útlendskir eygleiðarar. Føroyska skipið siglir í føroyskum, íslendskum, bretskum og altjóða sjógvi. Samlaði teinurin hjá føroyska partinum av T-NASS er umleið 2700 fjórðingar.

M/V Thor Chaser fór avstað sunnudagin 1. juli. Sambært Bjarni Mikkelsen á Náttúrugripasavninum, ið samskipar føroysku luttøku í T-NASS 2007 og sum er túrleiðarin umborð, vóru fyrstu dagarnir darvaðir av nógvum mjørka, men í gjár var slætt og klárt, og eygleiðarararnir hava longu sæð bæði grind, nebbafisk og døgling.

Undir skipateljingunum sita eygleiðararnir í tveimum liðum og telja. Tað ovara liðið hyggur við kikarum longur framman fyri skipið, meðan niðara liðið eygleiðir út á 500 m frá skipinum.

Undir sigling verður ein hydrofon (200 m kaðal) eisini sleipað eftir skipinum, ið upptekur ljóð frá hvali. Hetta er fyrstu ferð, at slík útgerð verður brúkt undir altjóða hvalateljing í Norðurhøvum. Umframt at hydrofonin eyðmerkir ávís sløg av tannhvali, skal hon eisini brúkast til at kanna títtleikan og meta um mongdina av nísu, avgusti og nevhvali (t.d døglingi).

Tað er vísindanevndin hjá NAMMCO, (Norðuratlantiska nevndin fyri samstarv um havsúgdýr), ið samskipar hvalateljingina, ið verður kallað T-NASS (Trans North Atlantic Sightings Survey). Føroyar saman við hinum NAMMCO limalondunum, Grønlandi, Íslandi og Noreg luttaka í T-NASS. Harumframt eru Kanada og Russland eisini við í kanningarætlanini. Aðrar teljingar verða eisini samstundis í amerikanskum og evropeiskum sjógvi.

Slíkar teljingar hava verið gjørdar við regluligum millumbilum síðan 1987, seinast í 2001. T-NASS 2007 verður tó tann mest umfatandi, tí hetta er fyrsta ferð, at Kanada og Russland eisini luttaka. Úrslitini av teljingunum kunnu m.a. geva grundarlag fyri at dagføra stovnsmetingina av grindahvali á okkara leiðum.

Meira fæst eisini at vita um T-NASS (á enskum) á heimasíðuni hjá NAMMCO www.nammco.no

